

## Heini Hanusarson: Hart at røkka tindinum

ÍTRÓTTUR síða 24

## Brennistøðin útbyggjast fyri 30 milliónir

INNANLANDS síða 2




# Dimmalætting

MÁNADAGUR 12. JANUAR 2009

Nr. 7 • 132. árgangur • Vika 3 • www.dimma.fo • Tlf. 541200 • Kr. 20,00


Mynd: Edvard Joensen

# VANDAMIKIL LJÓS Í TUNLI



INNANLANDS Síða 17

**Nýggju dioduljósini, sum sett eru upp í Leynatunlinum, gera tað ómøguligt hjá fólki við til dømis epilepsi at koyra bil gjøgnum tunnilin. Ljósini kunnu elva til herðindi**



## Thor brýtur ST-samtykt

INNANLANDS síða 14



## Kvinna brend sum heks

UTTANLANDS síða 12



*Tað tykist, at millum tollynt demokrati er tað bara í amerikansku Kongressini, at vernd móti yvirgangi, sum endar við slátri av hundraðtals palestinskum børnum, ikki førir til pínufulla sálarkvøl*

ROGER COHEN

UTTANLANDS síða 11

## 112 gekk fyri

**Í ófantaliga veðrinum um vikuskiftið hevði løgreglan nógv um at vera. Og mitt í tí heila gekk alarmsentralurin fyri**

INNANLANDS síða 6



## Nógvur fiskur á Toftum

**Tey høvdu úr at gera á landingarmiðstøðini á Toftum í morgun. Fimm skip vóru inni og løgdu veiðina upp**



INNANLANDS síða 2




Morgunstjørnan, her avmyndað, tá hon landaði á Toftum fyri jól, hevði ein vánaligan túr hesaferð. Mynd: Niclas Davidsen

# Vánaligur fiskiskapur norðanfyri

**Eisini í Klaksvík leggja fimm bátar veiðuna upp í dag. Eisini hesi skipini hava havt vánaligan fiskiskap. Og nú er streymurin eisini so harður, at skipini valla fara út aftur fyrr enn mitt í vikuni**



Sveinur Tróndarson
sveinur@dimma.fo

Klakkur, Jákup B., Polarstjørnan, Morgunstjørnan og Grani eru í morgun á Klaksvík við tí tey hava fingið henda fyrsta túrin í nýggja árinum.

Fýra tey fyrstu hava roynt norðan fyri Føroyar og Grani á Íslandsrygginum, men felags fyri allar bátarnar er, at veiðan hevur verið rættiliga misjøvn. Klakkur, er tann av teimum fimm, sum hevur fingið mest, men hann hevur bara 450 kassar inni. Hetta svarar til góð 28 tons.

Jákup B. hevur fingið 390 kassar henda túrin, og svarar tað til smá 25 tons. Grani fekk 310 kassar henda túrin, og svarar tað til smá 20 tons og Polarstjørnan fekk bara 255 kassar, sum svara til umleið 16 tons.

Ringasta túrin gjørdi Morgunstjørnan, sum bara fekk 90 kassar hesaferð. Hetta svarar til góð fimm tons. Tað var tó ein orsøk til, at túrurin hjá Morgunstjørnuni gjørdist so vánaligur sum hann gjørdist. Veðrið gjørdist heldur enn ikki vánaligt, og har aftur at fingu teir ávísar trupulleikar. Tí gjørdu teir av at bróta túrin av og fara inn.

Úr Klaksvík verður sagt, at fiskiskapurin hevur verið rættiliga vánaligur hesa vikuna. Harafturat hevur veðrið ikki verið til vildar, og tá streymviðurskiftini hesa vikuna heldur ikki eru tey bestu, fara skipini helst ikki út aftur fyrr enn mitt í hesi vikuni.

Øll veiðan, sum er løgd upp í Klaksvík í dag, verður seld um fiskamarknaðin fyrrapartin.

BLOGGAN Á DIMMA.FO

í Blogguni á dimma.fo finnur tú hvassar og beinraknar viðmerkingar um politikk, samfelagsmál, mentan og annað

# Thor inn í bannað

**Frálandavinna: Fyrsta stóra uppgávan hjá nýbygda frálandaskipinum Thor Omega er í sjógvi út fyri Vestur Sahara. Hetta er í stríð við ST-samtykt, og eitt tilmæli frá donsku stjórnini, sum mælir til at skip halda seg burtur frá umráðnum**



Georg L. Petersen
georg@dimma.fo




Thor Omega avmyndað í Las Palmas í farnu viku meðan tað bíðaði eftir at fara inn sjóøkið út fyri Vestur Sahara. Mynd: Sergio Ramírez

- Vit hava ein seks ára sáttmála við seismikkfelagið Fugro Geoteam, og fylgja skipinum Geo Caribbean. Vit hava ikki nakra ávirkan á, hvar seismikkskipið arbeiðir.

Tað sigur Gunnbjørn Joensen, ein av stjórunum í Thor Offshore. Nýggjasta skipið í flotanum hjá Thor er útgerðarskipið Thor Omega, sum nú arbeiðir saman við Geo Caribbean í sjógvi út fyri Vestur Sahara.

Hetta er ímóti altjóða tilráðingum, eisni donskum. Danska stjórnin er komið við eini áheitan á øll donsk felag um at halda seg burtur. Norska stjórnin hevur somuleiðis eina greiða støðu viðvíkjandi Vestur Sahara. Fugro Geoteam er eitt norskt seismikkfelag við 270 starvsfólkum í Noregi.

- Er hetta so, so virkar felagið í stríð við eina ST-samtykt, og sæð við norskum eygum er hetta sera álvarsligt, sigur fyrrverandi norski fíggjarmálaráðharrin Per-Kristian Foss úr Højre við norska Dagbladet í dag.

Og núverandi fíggjarmálaráðharrin úr SV, Kristin Halvorsen, heldur eisini málið vera álvarsligt. Í 2007 setti norski pensjónsgrunnurin 139 milliónir krónur í hollendska móðrfelagið hjá Fugro Geoteam.

- Eru upplýsingarnir rættir, kann tað hava við sær, at vit taka okkum aftur, sigur hon.

Tað er norska tíðindastovan Norwatch og journalisturin Erik Hagen, ið hava avdúkað norsk/føroyska virksemið í Vestur Sahara.

## Hertikið

Marokko hertók Vestur Sahara miðskeiðis í 70-unum, men altjóða samfelagið hevur ongantíð góðtikið økið sum ein part av Marokko.

Vestur Sahara er sera áhugavert, tí náttúruríkidømið er stórt, og stóra vónir eru settar til olju í umráðnum.

Norska stjórnin vil ikki góðtaka, at norsk feløg virka í umráðnum, og oljugrunnurin tók allar sínar pengar úr amerikanska oljufelagnum Kerr-McGee í 2005, tí hetta felagið arbeiddi í Vestur Sahara.

Eftir hetta tók Kerr-McGee seg úr umráðnum.

# Betabátarnir landaðu um vikuskiftið

**Partrolararnir hjá Beta rýmdu undan keðiliga veðrinum undan vikuskiftinum. Men tá høvdu teir fingið so nógv, at tað var skilabetri at landa um vikuskiftið. Skipini eru longu farin útaftur, og nú er veðrið aftur til vildar**

Sveinur Tróndarson

Skipini hjá Beta vóru inni um vikuskiftið. Hesi tíggju skipini gjørdu av at fara inn heldur enn at royna nakrar dagar aftur at í ringum veðri, og tað var kanska skilagott at brúka vikuskiftið til at leggja veiðina upp.

Polarhav og Stjørnan landaðu 175 tons seinnapartin fríggjadagin. Eisini Jaspis og Ametyst landaðu fríggjadagin, og høvdu teir 110 tons.

Leygardagin landaðu seks skip. Stelkur og Bakur, Heykur og Falkur og Rókur og Lerkur landaðu øll, og høvdu tey 423 tons tilsamans. Heykur og Falkur høvdu 103 tons, meðan hini bæði þorini høvdu 160 tons í part.

Hetta er sum sagt annar túrurin hjá þorunum, og tað verður latið rættiliga væl at fiskiskapinum. Hesaferð rýmdu skipini sum sagt undan keðiligum veðri, og tí høvdu teir kanska ikki so nógv inni sum teir annars kundu havt, tí fiskiskapurin er góður. Fyrsta túrin í ár fingu skipini hjá Beta 900 tons, so samanlagt hava hesi skipini longu lagt 1.600 tons upp á land.

Heldur ikki fyri upsan, hevur prísurin verið serliga



Partrolararnir hjá Beta hava havt góðan fiskiskap eftir upsa í ár. Um vikuskiftið løgdu teir umleið 700 tons upp, og samanlagt hava teir fingið umleið 1.600 tons

Savnsmynd

# an sjógv



Hetta er ikki fyrstu ferð at Thor arbeiðir í sjógvi út fyri Vestur Sahara. Í 2002 var felagið har fyrstu ferð við einum útgerðarskipi.

Hans Andrias Joensen, stjóri í Thor, segði í 2005 við Dimmalætting, at hetta ikki fór at henda aftur. Hann segði seg tá vera óvitandi um trupulleikarnar í landinum.

- Vit hava eitt motto sum sigur, at vit virða altjóða og nationalar ásetingar. Vit vilja gjarna signalera júst henda boðskap, segði hann við Dimmalætting 11. januar 2005.

Men nú, 12. januar 2009, er lyftið gjørt til einkis.

høgur. Ikki tí, hann er tvífalt so høgur sum hann var fyri tveimum árum síðan, men hálv sætta króna ljóðar ikki av so nógvum í dagsins virði.

Partrolararnir hjá Beta hava fyri tað mesta roynt eystanfyri.





Formaður í Reypa Krossi Føroya, er Súni Vinther

# Ársins Fyrstahjálpari 2008 skal veljast

**Reyði Krossur Føroya hevur sent hálvthundrað túsund krónur til hjálpararbeiði í krígsherjaða Gaza**



Beate L. Samuelsen
beate@dimma.fo

Nú nærkast tíðin, har Reyði Krossur Føroya fer at velja “Ársins Fyrstahjálpara 2008”. Hetta er tiltak, sum Reyði Krossur Føroya hevur skipað fyri í fleiri ár, og umframt at fáa eitt heiðursbræv frá Reyða Krossi Føroya, fær viðkomandi eina peningagávu, sum Tryggingarfelagið Føroyar letur.

Øll, bæði løgregla, bjargingarfeløg, skaðastovur, brandlið, virkir, stovnar og einstaklingar, kunnu lata inn uppskot til “Ársins Fyrstahjálpara 2008”. Tað, sum krevst, er, at viðkomandi, sum er í uppskoti, í farna ári á onkran serligan hátt hevur givið kropsliga ella sálarliga fyrstuhjálp.

## Freistin skjótt úti

Við at útnevna ein “Ársins Fyrstahjálpara” roynir felagsskapurin eisini at fáa fólk at læra seg fyrstuhjálp, so at vit kunnu bjarga uppaftur fleiri mannalívum.

Á øllum løgreglustøðum runt landið umframt á Reyða Krossi, fáast serlig oyðubløð, sum fyllast skulu út í sambandi við “Ársins Fyrstahjálpara 2008” oyðibløð.

Freistin at lata inn uppskot til “Ársins Fyrstahjálpara 2008” skal verða Reyða Krossi Føroya í hendi í seinasta lagi 31. januar 2009, og verður viðkomandi heiðraður mikudagin 11. februar.

Annars hevur Reyði Krossur í farnu viku sent kr. 50.000,- til hjálpararbeiði hjá alheims Reyða Kross felagsskapinum í Gaza, har kríggj er, og talið á særdum økist við stórari ferð.

## Hjálp til Gaza

Reyði Krossur er sum øllum kunnugt ein óheftur hjálparfelagsskapur, sum veitir hjálp til neyðstødd uttan at taka dagar ímillum partarnar, sum kríggjast. Arbeitt verður altíð við at hjálpa offrum á báðum síðum. Kríggið í Miðeystri millum Israel og Gaza í hesum døgum er í so máta ikki nakað undantak, men sum støðan er í løtuni, er tað í Gaza, at tørvurin á hjálp er sera stórur.

Umframt lækna- og sjúkrasystrahjálp er tørvurin á heilivági, brennievni til sjúkrabilar, reinum vatni og mati.

Leiðari fyri hjálpararbeiðinum hjá Reyða Krossi í Gaza er íslendska sjúkrasysturin Pálina Asgeirsdóttir. Haraftrat danski Reyði Krossur sent eina sjúkrasystur til Gaza.

Umframt peningin, sum longu er sendur avstað til hjálpararbeiði hjá Reyða Krossi í Gazageiranum, er Reyði Krossur Føroya farin undir peningainnsavning til offrini í krígsherjaðar landið í Miðeystri Gaza.





## Gamli maðurin á miðjuni

ÍTRÓTTUR síða 24

## **Arbeiðsgevarar:** Ein visjónsleys fíggjarlóg

INNANLANDS síða 2




# Dimmalætting

TIL HVØRT HÚS Í FØROYUM

TÝSDAGUR 13. JANUAR 2009

Nr. 8 • 132. árgangur • Vika 3 • www.dimma.fo • Tlf. 541200 • Kr. 20,00


# LEGÐI LOYNITØL Á INTERNETIÐ

Kappingarráðið legði í farnu viku loyniligar upplýsingar á heimasíðu sína. Ráðið ætlaði m.a. at fjala prísin, sum Vónin lat fyri Føroya Trol, men allar upplýsingarnar kundu við tveimum klikkjum á músina kortini lesast.
– Hatta er stak óheppið, men vit vistu ikki betur. Mannagongdin verður nú broytt, sigur Terje Sigurðsson, deildarstjóri



INNANLANDS
Síða 5



## Felags frontur móti lús

INNANLANDS síða 14



## Ísrael ætlaði at bumba Iran

UTTANLANDS síða 18

*Eg ivist ikki í, at ferðaseðlaprísirnir hjá Atlantsflogi hóska til útreiðslurnar, men hetta almenna felagið tænir ikki samfelagnum við at spæla privat fyritøka á einum marknaði uttan kapping*

ØSSUR WINTHEREIG

MEININGAR síða 12



# jarlóg



Ein vána fíggjarlóg. Føroya Arbeiðsgevarafelag ákærir samgonguna fyri at hava gloymt sína skyldu at framtíðartryggjað samfelagið, nú lættasta loysnin varð vald og skorið varð á leið tað sama yvir ein kamb. "Soleiðis verður eingin settur upp í móti nøkrum, og øll kunnu vera samd um at vera líka ónøgd". Arbeiðsgevarafelagið mælir landsstýrinum til at tora at taka avgerð um, "hvat skal leggjast niður fyri at annað skal kunna blóma" Savnsmynd

raðfestur útbúgving og gransking.

## Finnið dirvið fram

Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at landsstýrið við hesi fíggjarlógini er lopið upp um, har garðurin er lægstur. Landsstýrið hevur skorið á leið tað sama yvir ein kamb, soleiðis, at "eingin verður settur upp í móti nøkrum, og øll kunnu vera samd um at vera líka ónøgd". Hetta er greitt tekin um manglandi dirvi, og arbeiðsgevarar mæla í greiðum vendingum landsstýrinum til at spenna seg út.

- Tað ræður um at gera íløgur, sum skapa arbeiðspláss, og sum geva umsetning í landinum.

Raðfestingar mugu til. Men hvussu skal raðfestast, og hvat skal leggjast niður, fyri at annað skal kunna blóma? Tað er í hesum spurningum, at torføra tilgongdin liggur. Men ta tilgongdina vænta vit, at tey, sum hava bjóðað seg fram á politiska leikpallinum, tora at fara undir, soleiðis at orka eisini verður nýtt til at tryggja framtíð okkara, siga ónøgdu arbeiðsgevararnir.



Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við uttanríkismálum Savnsmynd

# Uttanríkisráðið kannar Thor málið

**FRÁLANDAVINNA: Uttanríkisráðið kanna nú málið við útgerðarskipinum Thor Omega, sum er arbeiðir í sjógvi út fyri Vestur Sahara. ST, danska stjórnin og fleiri aðrar mæla annars feløgum frá at arbeiða har, tí tað er brot á fólkarættin**



Georg L. Petersen
georg@dimma.fo

- Vit fara nú at kanna málið. Meira kann eg ikki siga nú.

Tað sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við uttanríkismálum, sum í hesum døgum er staddur í afrikanska landinum Liberia.

Tað er eisini í Afrika at Thor Offshore hevur virksemi, sum sambært ST er í stríð við fólkarættin.

Frá 1975 til 1979 hertók Marokko meginpartin av Vestur Sahara og gjørdi umráðið til ein part av Marokko. Men umheimurin hevur ongantíð góðkent hersetingina, og frælsisrørslan Polisario stríðist framvegis fyri at ein sjálvstøðugum Vestur Sahara.

ST hevur í fleiri umførum roynt at finna eina loysn, men tað hevur verið uttan úrslit. Meðan hesar tingingar hava verið, hevur ST mælt frá, at útlendkar fyritøku hava nakað virksemi í umráðnum, sum hevur sera stórt náttúrúríkidømi.

Men har eru nógvir pengar at vinna, og tí hava fleiri feløg roynt seg inn á umráðnum kortini.

Tað er ikki nakað beinleiðis handilsbann móti Marokko, men fleiri av heimsins londum mæla feløgum frá at virka har. Stóra danska skipafelagið J. Lauritzen flutti fosfat úr Vestur Sahara til New Zealand, men tað varð skjótt átalað, og danska stjórnin kom við eini almennari áheitan um at halda seg burtur.

"Danmark stuðlar eini eini tilgongd undir ST-leiðslu, sum skal finna eina friðarliga loysn fyri Vestur Sahara. Áðrenn nøkur endalig loysn er funnin, skal einki virksemi vera í umráðnum, sum gera seg inn á áhugamálini hjá fólkinum sum har býr, tá tað kemur til vinna burturúr náttúruríkidøminum", stendur millum annað í donsku yvirlýsingini.

"Danska stjórnin vil støðugt minna donsk feløg á, at tey hava eina ábyrgd mótvegis altjóða samfelagnum", stendur eisini.